# Ramsar-ætlan fyri Nólsoy

## Tilmæli um tiltøk at verja fugl, serliga sjófugl



Mynd: Didier Poncet

**Sent í almenna hoyring desember 2015**

# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit ..... 2

Fororð ..... 3

Samandráttur ..... 4

1. Inngangur ..... 5

2. Hóttanir og tilmæli ..... 5

   2.1. Rotta ..... 5

   2.2. Sigling ..... 9

   2.3. Ketta ..... 11

   2.4. Aðrar møguligar hóttanir ..... 12

3. Ramsar-sáttmálin ..... 14

   3.1. Hvat er Ramsar-sáttmálin? ..... 14

   3.2. Tilgongdin í Føroyum ..... 15

4. Lóggáva og amboð ..... 17

   4.1. Grannastevnulógin ..... 18

   4.2. Onnur viðkomandi lóggáva og amboð ..... 19

5. Nólsoy - lýsing ..... 21

   5.2. Yvirskipað lýsing av økinum ..... 21

6. Fuglateljing ..... 25

7. Keldur ..... 26

8. Fylgiskjøl ..... 26

# Fororð

Henda ætlan – Ramsar-ætlanin fyri Nólsoy – inniheldur tilmæli um, hvat eigur at verða gjørt fyri at verja Nólsoy sum Ramsar-øki, og vendir hon sær til nólsoyingar og onnur, sum varða av oynni, sum á einhvønn hátt kunnu seta tiltøk í verk, eitt nú Tórshavnar kommuna og landsmyndugleikar.

Ramsar-ætlanin kann dagførast, um Ramsar-nevndin fyri Nólsoy metir tað vera neyðugt.

Umhvørvisstovan hevur, í samstarvi við Ramsar-nevndina og bygdarfólkið í Nólsoy, skrivað ætlanina.

Vón okkara er, at tikið verður væl ímóti ætlanini, og at tilmælini verða fylgd, soleiðis, at tiltøk kunnu setast í verk, sum tryggja, at drunnhvítin, lundin og annar fuglur í Nólsoy kann trívast uttan hóttanir og óneyðugt órógv, bæði nú og í framtíðini.

Nevndin ivast ikki í, at um rætt verður farið fram, kann Ramsar-tilnevningin virka mennandi fyri oynna, ikki minst fyri ferðavinnuna.

Nevndin takkar øllum, sum á einhvønn hátt hava givið íkast ella hjálpt til við at gera ætlanina. Týdningarmesti parturin liggur tó fyri framman: at seta tiltøkini í verk.

Ætlanin og annað tilfar um Ramsar er at finna á www.us.fo

Ramsar-nevndin fyri Nólsoy

6. apríl 2016

# Samandráttur

Í hesi *Ramsar-ætlan fyri Nólsoy* verður fyrst greitt frá viðurskiftum, sum verða mett sum ein hóttan ímóti drunnhvíta, lunda og øðrum fugli í oynni. Fyri hvørja hóttan verður komið inn á møguligar loysnir. Trý høvuðstilmæli eru í ætlanini:

1. at gera reglur um rottu, serliga at fyribyrgja rottuinnrás í Nólsoy
2. at gera reglur um sigling kring oynna, serliga at fyribyrgja, at fuglur verður órógvaður av skjóttgangandi bátum.
3. at ansa eftir, um grannastevnusamtyktin um kettuhald virkar sum ætlað.

Fyri hvørja hóttan verður komið inn á møguligar loysnir, og eitt tilmæli orðað.

Eisini er ein lýsing av núverandi vitanini um støðuna hjá drunnhvíta og lunda, serliga í mun til tær fuglateljingar, sum eru gjørdar. Tilmæli eru gjørd um, hvat skal gerast framyvir fyri at kunnu fylgja gongdini hjá hesum fuglastovnum.

Síðani verður greitt frá um altjóða Ramsar-sáttmálan, og hví hann er viðkomandi fyri Nólsoy.

Greitt verður frá tilgongdini fram til, at Nólsoy varð lýst at vera Ramar øki: hvør hevur luttikið í arbeiðinum og um arbeiðið hjá Ramsar-nevndini fyri Nólsoy. Komið verður eisini inn á borgarafundir og hoyring av ætlanini.

Víðari verður greitt frá um viðkomandi lóggávu, og um hvørji amboð eru tøk, sum kunnu brúkast til at seta í verk tiltøk. Serligur dentur er lagdur á grannastevnu, og hvussu hon kann verða brúkt til at seta í verk reglur/tiltøk/mannagongdir fyri at verja fugl o.a.

Eisini verður greitt frá teimum náttúrugivnu orsøkunum til, at júst Nólsoy er Ramsar-øki. Ein nærri lýsing av eyðkennum í Nólsoy og av fuglalívinum í oynni er gjørd.

# 1. Inngangur

Í Føroyum eru trý Ramsar-øki: Nólsoy, Mykines og Skúvoy.

Fyri hvørja av hesum oyggjum skal ein Ramsar-ætlan gerast, sum m.a. ger tilmæli um, hvørji tiltøk skulu setast í verk fyri at verja fugl í oynni og umhvørvi teirra.

Hetta er Ramsar-ætlanin fyri Nólsoy, og er hon úrslit av arbeiðinum hjá Ramsar-nevndini fyri Nólsoy.

#### *1.1.1. Endamál við ætlanini*

Endamálið við hesi Ramsar-ætlan[1] er í stuttum at lýsa Nólsoy sum Ramsar-øki, serliga at lýsa viðurskifti, sum kunnu metast sum ein hóttan móti fugli í Nólsoy, og gera tilmæli og uppskot til møguligar loysnir, fyri at minka ella steðga hóttanunum og/ella forða møguligum komandi hóttanum. Ætlanin skal metast sum eitt tilmæli til allar viðkomandi partar, sum hava ábyrgd av og heimild til at taka stig, fyri at tryggja Nólsoy sum Ramsar-øki, t.e. fólkið í Nólsoy, Tórshavnar kommuna og landsmyndugleikar

Ætlanin er ikki løgfrøðiliga bindandi[2].

Í fylgiskjali 3 er eitt samlað yvirlit yvir øll tilmælini í hesi ætlan.

# 2. Hóttanir og tilmæli

Mett verður, at tað í Nólsoy serliga eru tríggjar týðandi hóttanir ímóti drunnhvíta, lunda og øðrum fugli:

1. Rotta
2. Sigling við nógvari ferð kring oynna
3. Ketta

## 2.1. Rotta

Rottan sigst vera komin til Føroyar fyrstu ferð fyri umleið 250 árum síðani, og seinasta innrás á eina oyggj var í 1898, tá ið rotta kom til Norðuroyggjar (Borðoy, Viðoy og Kunoy). Sannlíkindini fyri, at rotta kemur til oyggjar, har hon ikki er, eru tengd at fleiri

[1] Eisini nevnt fyrisitingarætlan; da: forvaltningsplan; en: management plan.
[2] Sambært grein 2.3 í Ramsar-sáttmálanum vil upptøka av einum øki á listanum yvir Ramsarøki ikki seta til viks tjóðarræði í landinum.

ymsum faktorum, men í høvuðsheitum kemur rotta bert til nýggjar oyggjar, har hon verður flutt við fólki, oftast ótilvitað.

Bæði úr einum fíggjarligum og náttúruverju sjónarhorni er tað nógv betri at fyribyrgja spjaðing av rottu, og kanska eisini mús, enn at skula oyða og endurbyggja náttúruna eftir eina rottuinnrás.

Í Føroyum eru 11 rottufríar oyggjar (Mynd 1), harav tríggjar hava havt einstakar ella nakrar fráboðanir um rottu.

Frágreiðingin Rottuspjaðing[3] viðgerð trupulleikan við rottu og ger tilmæli um tiltøk, sum kunnu setast í verk.

### *2.1.1. Støðan nú*

Umframt at vera í stórum váða fyri rottuinnrás, er Nólsoy helst ein tann týdningarmesta oyggin í Føroyum at verja móti rottu, ikki minst orsakað av stóra drunnhvítabølinum. Kemur rotta í drunnhvítabølið, fer hon uttan iva at gera stóran skaða á drunnhvíta-stovnin, umframt at hon ger nógvan annan skaða, t.d. á lunda, skráp og annan fugl.

Nógv mús er í Urðini í Nólsoy, og hugsandi er, at hon eisini ger skaða á drunnhvíta, men lítil vitan er um hetta. Tað kann henda seg, at viðurskiftini broytast soleiðis, at mús í størri mun enn fyrr fer at gera seg inn á t.d. drunnhvíta.

Nógvur flutningur er til Nólsoyar, bæði persónbilar, handilsvørur, fóður, gras og hoyggj. Síðani bilferja fór at sigla til Nólsoyar, er talið av akførum, ið koma til Nólsoyar, vaksið yvir 1500%, og harvið er vandin fyri, at rotta kemur í oynna eisini fleirfaldaður.

Á borgarafundi í Nólsoy 1. apríl 2014, metti eitt fundarfólk, at størsti vandin fyri at bera rottu í oynna er ruskbilurin. Hesin trupulleikin er síðani loystur, við tað, at Tórshavnar kommuna hevur broytt mannagongdina soleiðis, at ruskbilurin nú altíð fer tómur til Nólsoyar,  og verður vaskaður og kannaður av aktingarmanni frammanundan .

Frástøðan úr Streymoy má metast at vera ov long til, at rotta kann svimja til Nólsoyar, men skip liggja javnan tætt upp at oynni, og ferðafólk verða sett í land ymsastaðni á oynni.

Rotta er sædd í Nólsoy nakar ferðir, og í februar 2010 vóru rottuspor sædd í bygdini, sí mynd 2. Higartil eru rottuspor ella rotta sædd sjey ferðir í Nólsoy (pr. 23.10.2011, Sjúrður Hammer).

---

[3] Hammer, S. 2011. Rottuspjaðing. Umhvørvisstovan. Frágreiðing 2011:3. http://www.us.fo/Default.aspx?ID=5500



**Mynd 1**Mynd til vinstru: Rottufríar oyggjar. Oyggjar við rottu eru vístar við reyðum. Oyggjar, ið eru rottufríar, men har ein ella nakrar fráboðanir hava verið, eru vístar við gulum. Rottufríar oyggjar eru vístar við grønum. Myndin til høgru vísir tær oyggjar, sum eru raðfestar eftir sannlíkindi fyri innrás og vanda fyri náttúruna, um rotta kemur í oynna. Størsti vandi reyð, miðal gular, og minst vandi grønar. Kelda: Rottuspjaðing.

Rættiliga fitt av arbeiði er gjørt fyri at fyribyrgja, at rotta kemur til Nólsoyar. Ein arbeiðsbólkur varð settur við umboðum frá Tórshavnar kommunu, Búnaðarstovuni, Umhvørvisstovuni og Søvnum Landsins. M.a. varð arbeitt við at seta upp eftirlits-útbúnað (bitsneisar og tunnlar við blekk-kortum). Ymiskir trupulleikar, m.a. við veðri, gjørdu, at arbeiðið ikki kom á mál.[4]



**Mynd 2** Slóð eftir rottu í kavanum í Nólsoy í 1. feb. 2010. Mynd: Jens-Kjeld Jensen.

[4] Les meira her: http://www.jenskjeld.info/FO_side/rotta.html

Eisini varð ein egnaður hundahvølpur, nevndur Ayla, keyptur á sumri 2010, við fígging av umhvørvisverndarjáttanini hjá Innlendismálaráðnum. Ayla doyði síðst í 2014 av sjúku.

### 2.1.2. *Viðkomandi lóggáva*

Galdandi kunngerð frá 1962 um oyðing av rottu inniheldur ikki ásetingar um fyribyrging av rottuinnrás. Hinvegin ásetur hon, at kommunur einaferð um árið skulu skipa fyri rottuoyðing í øllum kommunum, har rotta er, og hava mann at taka sær av hesum.

Búnaðarstovan hevur eftirlit við, at kommunur halda reglurnar.

Kunngerðin er gomul og ótíðarhóskandi, og eigur at verða dagførd, eins og fyribyrging av rottuspjaðing eigur at gerast partur av kunngerðini. Hetta arbeiðið er byrjað.

### 2.1.3. *Møguligar loysnir*

So leingi sum eingin rotta er í Nólsoy, hevur fyribyrging av rottuinnrás alstóran týdning. Í frágreiðingini Rottuspjaðing eru fleiri tilmæli um at fyribyrgja, at rotta spjaðist til rottufríar oyggjar. Her eru nøkur av tilmælunum:

1. Neyvt eftirlit við fráfaringarstøðir,
2. Skelting umborð á skipum og við landgongd,
3. Kommunur samstarva um at hava felags aktingarfólk at taka sær av rottufyribyrging, eftirliti við rottukassum o.ø,
4. Aktingarfólk, eisini í rottufríum oyggjum,
5. Skeið/fundir fyri aktingarfólk um fyribyrging av rottuinnrás,
6. Seta krøv til flutning, t.d. av hoyggi, grasi, fóðri, bæði við skipi og tyrlu. Vøra má nýpakkast, og annars vera heil og óskadd, tá hon kemur til oynna. Vøra, sum ikki er nýpakkað, má goymast rottutrygt. Strangari eftirlit má vera við vøru, sum verður flutt við tyrlu, bæði áðrenn hon fer av meginlandinum og tá hon er komin til Nólsoyar. Kannast skal, hvussu slíkt eftirlit best kann skipast. Hvat verður gjørt aðrastaðni? Hvat ber til í Nólsoy?
7. Serligt eftirlit við ruskbingjum og ruskbilum,
8. Burturkast, fóður og annað lívrunnið tilfar skal goymast rottutrygt (bæði hjá borgarum, bóndum og virkjum),
9. Órudd má ikki liggja og sløðast,
10. Øll kloakkviðurskifti mugu vera í lagi,
11. Øll skip skulu vera rottufrí,
12. Skip eiga ikki at liggja fyri akker nærri enn 400 m úr rottufríari oyggj,
13. Skip skulu hava sanitets/rottusertifikat og brúka rottuskermar,
14. Krav um tilbúgvingarætlan.

### *2.1.4. Mál og tilmæli*

**Mál:** Nólsoy skal framhaldandi vera rottufrí.

**Tilmæli:**

1. Seta í verk skipan/mannagongdir fyri vøru, sum verður flutt til Nólsoyar, bæði við tyrlu og skipi, serliga áðrenn hon fer úr Havn, men eisini tá vøran er komin til Nólsoyar.
2. At tilbúgvingarætlan fyri at fyribyrgja rottuinnrás í Nólsoy verður gjørd. Hetta kundi verið gjørt í samstarvi millum Sørvágs-, Tórshavnar- og Skúvoyar kommunur.
3. At neyðugu tiltøkini omanfyri (1.-14.) verða sett í verk.
4. At kunngerðin um oyðing av rottu verður dagførd og víðkað til eisini at fevna um at fyribyrgja, at rotta spjaðist.

## 2.2. Sigling

Ferðavinnan í Føroyum hevur seinastu 10-20 árini verið í menning, sum millum annað kemur til sjóndar við, at alt fleiri tilboð eru til ferðafólk, m.a. túrar við skjóttgangandi bátum, serliga kring oyggjar sum Nólsoy og Hest, men eisini Skúvoy og onnur støð. Serliga er áhugavert hjá ferðafólki at síggja lunda og annan fugl á sjónum og fram við landi. At lata fólk kunna uppliva fugl, kann eggja til náttúrufyrilit, men um atlit ikki verður tikið at fuglinum, og ansað verður eftir ikki at styggja hann, kann slík sigling hava skaðilig árin á fuglin.

Mannaskapt órógv, serliga í reiðringartíðini, kann hava skaðilig árin á nógv sløg av sjófugli. Órógv kann vísa seg aftur á ymsan hátt. Vanligastu árinini, har mest órógv er, eru, at fuglur gevst at reiðrast. Fuglur kann eisini órógvast av virksemi langt burturi.

Eisini er staðfest, at lundi, sum verður órógvaður mitt í verpingartíðini, kann fara av reiðrinum. Árinini eru minni, eftir at pisan er komin út.

Tað er ymiskt, hvussu viðkvæmur ymiskur fuglur er fyri órógv. Á sjónum er lundi rættiliga viðkvæmur, meðan havhestur og rita eru minni viðkvom. Onnur viðurskifti, so sum stað/lendi, árstíð, veður, slag av órógv, frástøða, títtleikin av órógvi og um órógvið kemur av sjónum ella av landi, hava týdning. Nakrir fuglar kunnu venjast við órógv, meðan aðrir styggjast burtur.

Eftir, at Tórshavnar kommuna hevði fingið klagur frá fólki um, at bátar, ið sigla við nógvari ferð kring Nólsoy, órógva fugl, gjørdi kommunan í 2013 uppskot til leiðreglur fyri sigling um Nólsoy, Hest og Koltur.

Ferðavinnufelagið, sum umboðar bátaeigararnar, tók ikki undir við leiðreglunum, og varð tí ikki gjørt meiri við tað tá.

### 2.2.1. *Støðan nú*

Fleiri frásagnir eru frá fólki í Nólsoy um bátar, sum sigla tætt fram við landi við nógvari ferð og órógva fugl, bæði uppi á landi og á sjónum.

Í Nólsoy er tað serliga lundi, sum verður órógvaður av skjóttgangandi bátum.

Á borgarafundi í Nólsoy 1. apríl 2014 kom týðiliga fram, at bátar, sum sigla við nógvari ferð nær landi, eru ein stórur trupulleiki.

### 2.2.2. *Viðkomandi lóggáva*

Einhvør kann sigla tætt við land kring allar oyggjar. Einasta avmarkingin í lóggávu, er § 14 í fuglaveiðulógini, har ásett er, at "Innanfyri tey í hesi grein nevndu mark og tíðarskeið er forboðið at órógva fuglin av ótørvandi óljóði frá skipspípum ella øðrum gangi." Mett verður, at henda áseting er ótíðarhóskandi, og at neyðugt er við nýggjum og tíðarhóskandi reglum, sum regulera sigling og annað virksemi nær landi ávísa tíð av árinum, fyri at verja fuglin.

Nevnast kann, at sambært hegnlógini er ikki loyvt at stíga á land frá báti uttan loyvi frá eigara, sí kap. 4.2.1.

### 2.2.3. *Møguligar loysnir*

Til ber at áseta reglur í kunngerð, við heimild í havumhvørvisverndarlógini[5], sum avmarka sigling við skjóttgangandi førum kring Ramsar-oyggjarnar. Slíkar reglur kunnu fevna um:

1. Avmarkingar av støðd/hædd á skipi/báti og ferð, t.d. at hægst loyvda ferð skal vera 5 fjórðingar um tíman nærri enn 500 m úr landi frá 1. apríl til 1. september,
2. Forboð fyri at sigla við vatnskutarum nærri enn 500 m úr landi,
3. Loyvisskipan fyri vinnuliga ferðafólkasigling, sum m.a. veitir undantak frá forboðnum í pkt. 2, og við krøvum um t.d. loyvdum rutum, skelting umborð, eftirlit t.d. AIS[6], og luttøku á viðkomandi skeiði t.d. um fugl og náttúru.
4. Kunning til ferðafólk, t.d. skelting umborð á ferðafólkabátum, um hví tað er neyðugt at avmarka ferðina, tá fuglurin er viðkvæmastur.

Krøvini eiga eisini at verða galdandi fyri gummibátar o.l., eitt nú frá ferðamannaskipum.

Alt vanligt/traditionelt virksemi eigur at verða undantikið avmarkingum eins og sigling hjá strandfaraskipum o.l.

Neyðugt er at lýsa eina loyvisskipan, sum fevnir um alla vinnuliga ferðafólkasigling, og sum tryggjar, at øll sigling er burðardygg og serliga, at fuglur í Nólsoy ikki verður órógvaður av ferðafólkabátum. Ein slík skipan kann til dømis fevna um kort yvir

[5] http://logir.fo/Logtingslog/59-fra-17-05-2005-um-verju-av-havumhvorvinum
[6] Automatic Identification System

viðkvom øki, har ikki eigur at verða farið ávís tíðarskeið, og yvir minni viðkvom øki, har siglast kann við størri ferð nær at landi,

Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna verður góðkenningarmyndugleiki fyri sigling nærri enn 500 m úr landi í Nólsoy.

Umframt slíkar ítøkiligar reglur fyri bátar, kunnu reglur eisini verða gjørdar, t.d. við grannastevnusamtykt, fyri at verja lundan, so sum:

- Reglur um at stíga á land ávís støð, har lundi og annar fuglur kann verða órógvaður,
- Hava øki, har ferðafólkabátar kunnu vitja, so møgulig skaðilig árin verða avmarkað til eitt ella nøkur fá øki.

Ferðafólkaskip eiga ikki at kunna sigla ella liggja nærhendis oyggjunum uttan loyvi frá kommununi. Kommunurnar eiga tí at velja hóskandi øki, har hesi skip kunnu liggja.

Forboðið ímóti at brúka skipsfloytur (eins og ásett í fuglaveiðilógini) kundi verið tikið við í Ramsar-kunngerðina fyri sigling.

### *2.2.4. Mál og tilmæli*

**Mál:** Sigling kring Nólsoy skal ikki órógva fuglalívið.

**Tilmæli:**
1. At kunngerð um sigling kring Ramsar-oyggjarnar verður sett í gildi at fyribyrgja, at fuglur verður órógvaður.
2. At lýsa eina loyvisskipan, sum tryggjar, at øll sigling og nýtsla av vatnskutarum er burðardygg, og serliga, at fuglur í Nólsoy ikki verður órógvaður av ferðafólkabátum.
3. Havnarmyndugleikin skal hava mannagongd fyri, hvar ferðamannaskip kunnu liggja.

## 2.3. Ketta

Ketta er rovdjór, sum m.a. veiðir fugl. Vitanin um, hvussu nógvan fugl kettan tekur, er tó ikki stór. Í bókini *Færøsk Trækfugleatlas*, er staðfest, at av teimum ringmerktu drunnhvítunum, sum eru funnir deyðir, eru lutfalsliga nógvir tiknir av kettu.

Á grannastevnu 7. mars 2014 varð samtykt at "allar leysgangandi kettu í bygdini skulu verða kippmerktar, geldar og bera hálsband við navni eigarans. Somuleiðis skulu allar kettur verða skrásettar hjá Tórshavnar kommunu við, slag, liti og onnur sereyðkenni á kettuni, og áliggur hetta eigaranum at boða frá hesum".

Í viðtøkunum stendur víðari, at "at forboð verður sett kettum, ið ikki eru skrásettar, at ganga leysar í Nólsoy. Hvørt húski hevur bert loyvi til at hava eina leysgangandi kettu.

Undantøk verða kortini givin teimum, ið hava tvær ella fleiri kettur í dag, og verður hetta galdandi, til hesar kettur doyggja. Brot á hesar reglur kunnu føra til, at kettur verða avlívaðar". Tveir mans eru settir at syrgja fyri, at samtyktin verður hildin.

Reglurnar, sum komu í gildi 3. september 2014, eru ein herðing av grannastevnu-samtykt frá 1995.

Mett verður, at galdandi grannastevnusamtykt er nøktandi. Tó eigur at verða fylgt við, um hon virkar sum ætlað.

### *2.3.1. Mál og tilmæli*

| |
|---|
| **Mál:** Ketta skal ikki vera ein hóttan fyri drunnhvíta og annan fugl. |
| **Tilmæli:** At ansa eftir, um samtyktin virkar sum ætlað. |




**Mynd 3** Kunngerð um skráseting av kettu í Nólsoy.

## 2.4. Aðrar møguligar hóttanir

Sum áður nevnt, verður rottan, sigling við nógvari ferð og kettan mett sum størstu hóttanir ímóti fuglalívi í Nólsoy. Ramsar-nevndin hevur avgjørt fyrst og fremst at arbeiða við hesum trimum málum, so at tilmælini kunnu setast í verk skjótast til ber.

Umframt nevndu hóttanir eru aðrar hóttanir nevndar niðanfyri, sum nevndin, um tað verður mett neyðugt, fer at arbeiða við seinni. Fyri ávísar hóttanir, eru fyribils tilmæli gjørd.

### *2.4.1. Órógv av koyring við motorakførum í haganum*

Nevndin hevur umrøtt spurningin um nýtslu av motorakførum, serliga sokallaðum bóndasúkklum/ATV'arum (All Terrain Vehicle; akfør, sum kunnu koyra á nærum øllum lendi). Yvirhøvur varð mett, at nýtslan av ATV'arum í haganum eigur at vera avmarkað mest møguligt, og at koyring ikki kann fara fram uttan loyvi frá hagastýri.

Nevndin metir, at ein møgulig loysn er, at nólsoyingar leggja fram uppskot á grannastevnu um koyring við motorakførum í haganum.

### *2.4.2. Órógv av gongd í haganum*

Allar flestu ferðafólkini, sum fara í hagan, ganga út á Borðuna. Hesi eru ikki til ampa fyri drunnhvíta ella lunda, ella onnur Ramsar-virði í oynni. Nøkur ganga sínar egnu leiðir í haganum. Á borgarafundi í Nólsoy 1. apríl 2014 var ein ávís ónøgd við, at ferðafólk ganga í haganum uttan loyvi og summi enntá við hundi/leysum hundi. Hetta er ikki loyvt, sambært hegnlógini.

Tað er týdningarmikið, at mannagongdir eru fyri, hvar fólk kunnu ganga og nær, og um t.d. ferðaleiðari skal vera við.

Gøtur, har fólk kunnu ganga, eiga at verða merktar við skeltum. Skelti eiga ikki at verða sett upp uttan so, at avvarðandi hagastýri hevur góðkent tekstin.

Kort eiga at verða gjørd, sum vísa, hvar gangast kann, og hvar til ber at síggja fugl.

Nevnast kann, at í Skúvoy eru tey byrjað at merkja, hvar gangast kann. Hetta er skipað soleiðis, at ferðafólk kunnu ganga í haganum og síggja fugl uttan at órógva fuglin.

*Fyribils tilmæli:* Luttaka í verkætlan um at menna skipan fyri gongd í haganum, skelting, kunning, skeið fyri ferðaleiðarar, o.s.fr. Gera kort, staðfesta, hvar øll hava rætt at ganga.

### *2.4.3. Órógv av ljósi frá aling á sjónum*

Í eini royndarverkætlan hava Fiskaaling/Havbúnaðarfelagið lagt aliringar umleið ein km eystan fyri Nólsoy fyri at kanna, um økið er egnað til aling, og um aliringarnir kunnu liggja á slíkum økjum.

Um tað verður aktuelt, kann gerast neyðugt at kanna nærri, hvørt aliútgerðin kann órógva Ramsar-virði í Nólsoy.

### *2.4.4. Skjóting*

Nevndin fer møguliga at taka evnið um skjóting upp seinni.

### *2.4.5. Tyrluflúgving*

Tyrluflugving kann vera við til at styggja fuglin, og er tí umráðandi, at hugsað verður um tað, tá flogið verður.

Óneyðug tyrluflugving eigur ikki at fara fram nær fuglabjørgum, serliga tá fuglurin reiðrast.

#### *2.4.6. Veiða*

Í Nólsoy hevur eingin lundaveiða verið í fleiri ár av tí, at lítið og einki hevur verið til.

Í 2013 varð á grannastevnu samtykt at friða lundan. Tað vísti seg tó seinni, at samtyktin var ógildug, og tí ikki galdandi.

Nevndin er samd um, at veiðilógin eigur at verða broytt, møguliga soleiðis, at landsstýrismaðurin fær heimild til við kunngerð at seta tíðaravmarkað veiðibann.

Nevndin tekur málið upp í næstum.

#### *2.4.7. Fremmand sløg*

Djóra- og plantusløg kunnu breiða seg natúrliga, men tey kunnu eisini sløðast inn á nýggj øki við fólki – bæði ætlað og ótilætlað. Fremmand sløg eru tey, sum við mannavirksemi hava breitt seg út um upprunaøkið. Slík sløg kunnu gerast ein trupulleiki, um tey kappast við upprunasløg ella kynblandast við hesi sløg ella liva av teimum. Fremmand sløg á nýggjum økjum kunnu samstundis breiða sjúkur ella á annan hátt órógva vistskipanir og búøki. Tá ið natúrligu fíggindar teirra ikki eru til staðar, kann vera lætt at vinna á upprunasløgunum.

Í Nólsoy eru hesi fremmandu djórasløgini: flatmaðkur, froskur, mús og hara.

*Fyribils tilmæli:* at kanna hvat kann gerast fyri at basa flatmaðki og fyribyrgja at morsnigli kemur til Nólsoyar.

# 3. Ramsar-sáttmálin

Ramsar-er ein av fleiri altjóða sáttmálum, sum hava til endamáls at verja náttúruna.

## 3.1. Hvat er Ramsar-sáttmálin?

Í 1971 varð "Millumtjóðasáttmálin um vernd av vátøkjum av altjóða týdningi serstakliga sum búøki hjá vatnfuglum" samtyktur. Á gerandismáli verður sáttmálin nevndur Ramsar-sáttmálin[7].

Sáttmálin kom í gildi í 1975, og hava nú 169 lond tikið undir við honum, teirra millum øll Norðurlond. Tilsamans eru nú 2.220 Ramsar-øki í heiminum. Føroyar tóku undir við Ramsar-sáttmálanum í 1977, sum partur av danska kongaríkinum.

#### *3.1.1. Skyldur*

Lond, sum hava tikið undir við sáttmálanum, binda seg til at tilnevna í minsta lagi eitt Ramsar-øki, og at arbeiða fyri at tryggja vernd av vátøkjum. At gagnnýta vátøki skal

---

[7] http://www.ramsar.org/

gerast á ein burðardyggan hátt. Tað vil siga, at umsitingin av einum Ramsar-øki bæði skal varða av tess virði og tryggja, at gagnnýtslan av økinum ikki minkar um virðið.

### *3.1.2. Endamál*

Upprunaliga var endamálið við sáttmálanum einans at verja vátøki av altjóða týdningi, serstakliga búøki hjá vatn- og sjófuglum. Men seinastu árini er Ramsar-sáttmálin eisini farin at fata um fuglabjørg. Higartil eru tað tó einans í Norra og í Føroyum, at fuglabjørg eru tilnevnd sum Ramsar-øki.

Eitt øki verður mett at hava altjóða týdning, um har eru fleiri enn 20.000 fuglar av einum slag, ella um tað í minsta lagi er 1% av heimsstovninum av einum slagi ella undirslagi á økinum.

Eitt annað endamál við Ramsar-sáttmálanum er at tryggja eina skynsama gagnnýtslu og varðveitslu av náttúruni, og - um neyðugt - seta tiltøk í verk fyri at verja náttúruna. Tiltøk skulu altíð taka atlit at lokalsamfelagnum, eins og øll verandi nýtsla og siðir, veiða og annað virksemi kunnu halda fram, so leingi sum tað ikki er ein hóttan ímóti fugli ella teirra umhvørvi. Fer eitt virksemi fram, sum ikki verður mett burðardygt, og sum kann skaða fugl í Nólsoy, ella teirra natúrliga umhvørvi (serliga fugl, sum var orsøk til, at Nólsoy varð útpeikað til Ramsar-øki), eiga stig at verða tikin til broytingar.

## 3.2. Tilgongdin í Føroyum

Í 2010 fór táverandi Innlendismálaráð undir at fyrireika útnevning av Ramsar-økjum í Føroyum. Hetta sambært skyldu í sáttmálanum. Undan tilnevningini høvdu serliga Havstovan, Náttúrugripasavnið og Føroya fuglafrøðifelag gjørt eitt drúgt fyrireikingararbeiði at savna og skipa neyðugar dátur og upplýsingar, sum skuldu nágreinast í umsóknarbløðunum til Ramsar-skrivstovuna. Umsóknin varð tilevnað í kjalarvørrinum á einum stórum Ramsar-fundi í Tinganesi, har umboð frá Ramsar-skrivstovuni, fólk úr Danmark, Grønlandi, Íslandi og umboð fyri føroyskar myndugleikar, kommunur og felagsskapir greiddu frá, hvussu farast skuldi fram fyri at útpeika øki.

Náttúrugripasavnið og Havstovan tilevnaðu umsóknina til Ramsar-skrivstovuna, har Nólsoy, Mykines og Skúvoy vórðu innstillaðar til at gerast Ramsar-øki. Á Ramsar-partsfundi í Bukarest í juli 2012 vórðu tilnevningarnar av Nólsoy, Mykines og Skúvoy góðkendar. Nólsoy er Ramsar-øki nummar 2052.

14. mars 2013 fingu borgarstjórarnir í teimum trimum tilnevndu Ramsarøkjunum heiðursskjal fyri tilnevningina.

Í juni 2013 legði táverandi Innlendismálaráð uppgávuna at fyrisita tilnevndu Ramsar-oyggjarnar til Umhvørvisstovuna, herundir at standa fyri arbeiðinum at gera Ramsar-ætlanir fyri Nólsoy, Mykines og Skúvoy.



**Mynd 4** Kári P. Højgaard, táverandi landsstýrismaður í Innlendismálum saman við Suna Jacobsen, borgarstjóra í Sørvágs kommunu, Harry Jensen, borgarstjóra í Skúvoyar kommunu og Heðini Mortensen, borgarstjóra í Tórshavnar kommunu, beint eftir handanina av Ramsar-heiðursbrøvum.

### *3.2.1. Ramsar-nevndin fyri Nólsoy*

Á vári 2014 varð Ramsar-nevndin fyri Nólsoy skipað við tí høvuðsendamáli at gera eina Ramsar-ætlan fyri Nólsoy. Limir í Ramsar-nevndini eru:

- Hagastýrini í Nólsoy: Kaj Olsen og Jógvan Thomsen,
- Ramsar-umboðið í Nólsoy: Jens-Kjeld Jensen,
- Kunningarstovan í Nólsoy: Tjóðhild Patursson.
- Tórshavnar kommuna: Fríðbjørg Næss Joensen,
- Søvn landsins/Náttúrugripasavnið: Janus Hansen,
- Umhvørvisstovan: Maria Gunnleivsdóttir Hansen og Suni Petersen

Nevndin avtalaði, at Umhvørvisstovan skuldi fyriskipa nevndararbeiðið, til fyrsta Ramsar-ætlanin fyri Nólsoy er liðug. Viðtøkurnar fyri nevndina eru í fylgiskjali 2.

Avgjørt varð, at aðrir áhugapartar eftir tørvi skulu takast við í arbeiðið. Nevndin hevur skipað fyri almennum fundum, t.d. var borgarafundur Royndarhúsinum í Nólsoy 1. apríl 2014, har kunnað varð um Ramsar og um ætlanina at gera Ramsar-ætlan fyri Nólsoy. Yvir 50 fólk vóru á fundinum og orðaskiftið var dúgligt og fleiri góð sjónarmið og uppskot komu fram. Fleiri hildu tó, at almenna kunningin til bygdarfólkið kundi verið betri og kendu seg ótrygg um, hvørt Ramsar-ætlanin fer at seta forðingar fyri siðvenju og virksemi hjá bygdarfólkinum.

11. mars 2015, var nýggjur borgarafundur í Nólsoy, har uppskot til fyrstu Ramsar-ætlanina varð lagt fram. Seinni, í desember 2015, varð ætlanin løgd út í almenna hoyring í 4 vikur.



**Mynd 5** Fyrsti borgarafundur í Royndarhúsinum í Nólsoy var tann 1. apríl 2014.

### *3.2.2. Luttakandi partarnir*

Ein høvuðstreyt fyri, at arbeiðið við Ramsar-ætlanini skal eydnast, er, at fólkið í Nólsoy er partur av tilgongdini at gera ætlanina, her undir serliga at verða við til at gera av, hvørji tiltøk skulu setast í verk. Fólkið á staðnum hevur bestu vitanina um fugl og náttúruna í økinum og kennir til siðvenju við veiðu, og hvussu fuglatilfeingið er umsitið gjøgnum tíðirnar. Tað er tí eyðsæð, at fólkið á staðnum eru tey, sum best kunnu geva góð boð uppá tiltøk at seta í verk, at fyribyrgja skaða, ella minka um hóttanir móti fugli. Best er eisini, at tað er fólkið á staðnum, sum - við galdandi reglum og siðvenju - sjálvi skipa fyri at seta í verk tiltøk og annað, sum er neyðugt fyri at verja Ramsar-virðini. T.d. við grannastevnuviðtøkum (sí kap. 4.1.1).

Hóast tað strangt tikið ikki er neyðugt, er tað eisini eyðsæð, at kommunalir og almennir myndugleikar eisini eru partar í Ramsar-arbeiðinum, umframt stovnar, sum hava vitan um fugl og náttúru. Ikki minst av tí, at tað fyri ein part eru somu stovnar, sum skulu seta tiltøkini í verk.

# 4. Lóggáva og amboð

Her verður lýst, hvør lóggáva og hvørji amboð eru tøk fyri at handhevja verandi reglur og/ella seta í verk nýggjar reglur, mannagongdir ella tiltøk, sum kunnu gerast neyðug fyri at verja fugl og umhvørvi teirra, og sostatt eisini tryggja Nólsoy sum Ramsar-øki. Serliga viðkomandi er grannastevnulógin, sum gevur borgarum møguleika fyri at leggja fram uppskot á grannastevnu.

## 4.1. Grannastevnulógin

Grannastevnulógin[8] er ein rammulóg um felagsviðurskifti. Lógin ásetur, hvussu grannastevna skal skipast.

Á grannastevnu kunnu viðtøkur gerast um:

- nýtslu av jarðarognum og lunnindum, sum eru feli, og sum tað ikki sambært lóggávuni skal takast avgerð um á hagastevnu ella á annan serligan hátt,
- slík viðurskifti, sum annars við lóggávuni eru løgd til avgerðar á grannastevnu (sambært hagalógini, hegnlógini, lóg um nýtslu av vatni v.m., lóg um veiðu, fuglaveiðu v.m. frá 4. apríl 1928; lóg um týning av yngli hjá ravninum frá 11. mars 1892),
- skipan av slíkum innanbygdaviðurskiftum, sum hava almennan týdning fyri íbúgvarnar, uttan tó at hoyra undir ta kommunalu fyrisitingina.

Viðtøkurnar skulu gerast við atliti til reglur, sum eru í sjálvari grannastevnulógini ella sum eru fyrisettar í aðrari lóggávu, t.d. fuglaveiðulógini.

Grannastevnan er soleiðis eitt gott amboð at brúka, tá tørvur er á at gera samtyktir um viðurskifti, sum hótta fugl ella umhvørvi teirra. Umframt fuglaveiðu, kundu í Nólsoy eisini verið gjørdar samtyktir um t.d. gongd í haganum (so ferðafólk ikki órógva fuglin) ella flutning av vøru til oynna við tyrlu, t.d. kraftfóður (minka um vandan fyri at rotta verður flutt til oynna).

Samtyktir um lundaveiðu skulu gerast á grannastevnu

Rætturin at veiða lunda og annan fugl fylgir í stóran mun jørðini. Av tí, at fuglur og lunnindi ikki eru útskift í Nólsoy, er fuglaveiða felagsrættur fyri allar tríggjar hagarnar. Hagastýrini hava tí ikki rætt til at gera samtykir um t.d. fuglaveiðu. Rætta staðið at gera samtyktir um veiðu av fugli, er á grannastevnu.

Við øðrum orðum hevur hvørki tann einstaki jarðareigarin ella hagastýrislimurin nakra beinleiðis heimild at regulera veiðu.

Í § 2 í fuglaveiðilógini[9] er ásett, at grannastevna kann gera samtykt um nýtslu av veiðirætti í felag:

"*Samtykt at nýtsla av veiðirætti í felag kann gerast á grannastevnu. Í tílíkari samtykt kann fyrisetast, at veiða bert kann fara fram í minni mun ella yvirhøvur ikki.*

*Allir eigarar hava atkvøðurætt á grannastevnu um samtykt um veiði í felag.*

---

[8] Lov nr. 170 af 18. maj 1937 for Færøerne om grandestævne m.m. Grannastevnulógin týdd til føroyskt: http://www.heimabeiti.fo/default.asp?menu=52

[9] Løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 15. mai 2014,

*Einsæris burturlating av veiðirætti kann bert fara fram fyri upp í 10 ár í senn.*

*Friðing yvirhøvur ella partvís innangarðs í eini bygd, har fleiri eigarir eru, kann bert fremjast á grannastevnu. Atkvøðurætt um samtyktina hevur einhvør eigari innangarðs og kongsbøndur.*

*Til gylduga samtykt krevst yvir helmingur av atkvøðugevandi persónum, sum umboða minst helmingin av skattamarkatalinum, sum atkvøðurætt hevur*".

### 4.1.1. Grannastevnusamtyktir í Nólsoy

Í Nólsoy eru grannastevnusamtyktir áður gjørdar, t.d. um at seta forboð ímóti lundafleyg og um kettuhald.

Tað kann møguliga gerast aktuelt fyri nólsoyingar at gera grannastevnusamtykt um rottu, eins og gjørt er í Skúvoy, har forboð fyri at flyta inn hoyggj og gras varð samtykt á grannastevnu, fyri at fyribyrgja rottuinnrás.

### 4.1.2. Avtalur

Um nólsoyingar hava loysnir uppá viðurskifti, sum hótta fugl og onnur Ramsarvirði, ber til at gera avtalur um tað. Tess nærri at fólkinum á staðnum ein avgerð verður tikin, tess betri.

## 4.2. Onnur viðkomandi lóggáva og amboð

Her verður nomið við aðra lóggávu, sum kann vera viðkomandi fyri Nólsoy sum Ramsar-øki.

### 4.2.1. Hegnlógin

Hegnlógin (Lov om hegn og markfred)[10], er ein serlóg um hegn, gongd og ferðslu í haganum. Við støði í lógartekstinum ber til at staðfesta, at:

- Høvuðsreglan er, at gongd er forboðin uttan loyvi frá eigara.
- Øll hava rætt at ganga eftir bygda- og varðagøtum.
- Øll, sum eiga jørð, kunnu ganga eftir gøtum til *fjernere-liggende fuglebjerg eller udmark*, sum tey hava rætt til, t.d. fleygasessir.
- Røktarar kunnu røkta sín seyð o.a., bara teir boða eigaranum frá.
- Onnur, sum hava ørindi í haganum, kunnu fyri stóran part ganga í høgum, um ørindini eru gomul siðvenja: "*gang til fjernereliggende Hauge, Fuglebjerg eller anden Udmark, som den paagældende eller den, i hvis Ærinde han gaar, ejer eller*

[10] Lov nr. 171 af 18. Maj 1937 for Færøerne om hegn og markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 fra 17. mars 1951.

*har Brugsret over, er tilladt, for saa vidt den hjemles ved det, som paa ethvert Sted er gammel Skik og Brug*".

Ivamál verða løgd fyri landbúnaðarstevnu.

Hetta merkir, at tey, sum eiga jørð í Nólsoy, kunnu, um alla oynna, ganga eftir teimum gøtum, sum hava verið nýttar í sambandi við fuglaveiði og onnur lunnindi

Somu ásetingar eru galdandi, tá siglt verður við báti fram við landi. Tá er heldur ikki loyvt at stíga á land uttan loyvi frá eigara, eins og tá loyvi skal gevast til at ferðast í haganum.

#### *4.2.2. Havumhvørvislógin*

Havumhvørvislógin[11] hevur ávísar ásetingar, sum kunnu brúkast í Ramsar-høpi fyri at minka um hóttanir móti fugli. § 20 í havumhvørvislógini gevur landsstýrismanninum heimild til at áseta reglur um at fyribyrgja og minka um dálking og aðra ávirkan á náttúru og umhvørvi frá virksemi á sjónum. Ætlanin er at brúka hesa heimild til at seta í gildi kunngerð um sigling kring Ramsar-oyggjar, sí kap. 2.2 um sigling.

#### *4.2.3. Lóg um náttúrufriðing*

Friðingarmyndugleikarnir hava, sambært lóg um náttúrufriðing[12], heimild til at seta í verk friðingartiltøk at galda fyri øki á landi, á vøtnum og áum, tá ið friðingin má haldast ynskjandi av vísindaligum ella søguligum orsøkum. Eisini kunnu friðingar gerast í økjum, sum hava sereyðkenni, t.d. serligt djóra- og plantulív. Friðingarnevndirnar kring landið og Yvirfriðingarnevndin umsita náttúrufriðingarlógina.[13]

#### *4.2.4. Kunngerð um oyðing av rottu*

Tað er av stórum týdningi at fyribyrgja, at rotta kemur í rottufríar oyggjar. Kemur rotta í rottufríar oyggjar, so sum Nólsoy, fer tað at hava stórar avleiðingar fyri fuglastovnarnar. Rotta legst á fuglareiður og kann hon soleiðis oyða fuglin. Sum nú er, eru ongar reglur um at fyribyrgja, at rotta spjaðist til rottufríar oyggjar. Einastu reglur sum eru um rottu, er kunngerð um oyðing av rottu[14], sum einans hevur ásetingar um júst oyðing av rottu.

---

[11] Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, sum broytt við løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2011

[12] Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995.

[13] http://www.himr.fo/arbeidisokir/nattura-umhvorvi-og-lendi/natturuvernd/

[14] Kunngerð nr. 20 frá 16. mai 1962 um oyðing av rottu, sum broytt við kunngerð nr. 61 frá 6. november 1962

# 5. Nólsoy - lýsing

Her er ein almenn lýsing av Nólsoy og vistskipanum á oynni.

Ramsar-økið fevnir um alla Nólsoynna og út á 500 m úr landi . Sí kort í fylgiskjali 1.

### *5.1.1. Almenn lýsing*

Í Nólsoy búgva 260 fólk. Nólsoy er partur av Tórshavnar kommunu og liggur oyggin tríggjar km eystan fyri Streymoy. Hægsta fjallið, Eggjarklettur, er 371 m høgt.

Í Nólsoy eru tríggir hagar, og sostatt trý hagastýri, Heimara helvt (22 merkur), Junkarshagi (14 merkur) og Borðan (12 merkur).

### *5.1.2. Kriterii fyri útnevning*

Tað kunnu vera níggju grundgevingar fyri, at eitt øki verður góðkent sum Ramsar-øki. Nólsoy er góðkend sambært fimm av hesum grundgevingum. Í stuttum eru grundgevingarnar hesar:

- Stovnurin av drunnhvíta í Nólsoy er mettur til 50.000 pør, sum er ein týðandi partur av stovninum í Norðuratlantshavi.
- Í Nólsoy eiga oman fyri 80.000 pør av sjófugli, av hesum uml. 50.000 pør av drunnhvíta og uml. 30.000 pør av lunda.
- Drunnhvítin í Nólsoy, sum er mettur til 50.000 pør, fevnir um uml. 11 % av heimsstovninum av drunnhvíta.

Men nýggjar kanningar hjá fuglafrøðingum benda á, at bæði drunnhvítin og lundin eru í minking, og at tað er óregluligt hvussu nógv pisa kemur undan.

## 5.2. Yvirskipað lýsing av økinum

Tær nógvu skriðurnar og urðarnar í Nólsoy geva góðar møguleikar hjá drunnhvítanum at reiðrast, og er hetta eisini grundin til stóra talið av drunnhvíta í oynni.

Eisini er fitt av lundalandi og fuglabergi í oynni, ið húsa týðandi nøgdir av lunda, ritu , havhesti og teista . Mett verður, at meira enn 80.000 pør av sjófugli eiga í oynni, og at ein av størstu drunnhvítabølunum í heiminum, við umleið 50.000 pørum, eisini er í oynni.

### *5.2.1. Vistfrøðilig lýsing*

Drunnhvítin reiðrast í holum, við inngongdini fjaldari millum steinarnar. Hann leitar sær føði úti á opnum havi.

Í mun til annan sjófugl leitar teistin sær føði nær landi. Hetta merkir, at hann bæði reiðrast og leitar sær føði í Ramsar-økinum. Men lundi og rita liggja eisini javnan og hvíla á sjónum beint uttanfyri. Sama er galdandi fyri havhestaungar, tað fyrstu tíðina eftir teir eru floygdir. Hvussu nógv kemur undan av sjófugli sveiggjar nógv frá einum

árið til annað. Uttan fyri búðtíðina heldur størsti partur av sjófuglinum til úti á opnum havi.

### *5.2.2. Drunnhvíti*

IUCN[15] metir, at drunnhvíti er "ikki hóttur", hóast stovnurin minkandi .

Royndir eru gjørdar at fáa tal á, hvussu stórur stovnurin í Urðini í Nólsoy er við skipaðum teljingum. Yvir 30.000 drunnhvítar eru ringmerktir.



**Mynd 6** Drunnhvíti. Mynd: Jens-Kjeld Jensen.

Stór óvissa er um talið av drunnhvíta í Føroyum. Hetta er tó ikki óvæntað, tí talið als ikki er lætt at meta um. Nakrir granskarar hava mett, at støddin á føroyska stovninum var ímillum 50.000 og 100.000 pør. Aðrir hava mett, at samlaða talið av drunnhvíta, sum eigur í ymsu oyggjunum í Føroyum, var um 250.000 pør. Eingin skipað teljing liggur til grund fyri hesum metingum, tó royndir við ringmerkingum og eygleiðingar hava givið innlit í útbreiðslu og meingi, serstakliga í Nólsoy og Koltri.

Væntandi er lítið av drunnhvíta á oyggjum, har rotta er. Roknast kann við, at drunnhvíti finst um allar Føroyar, og nógv finst í Mykinesi, Fugloy, Svínoy, Nólsoy, Sandoy, Skúvoy og Stóru Dímun, meðan minni er til á hinum oyggjunum. Hildið verður, at møguliga størsta drunnhvítabølið í heiminum er í Urðini í Nólsoy, men nøktandi tilfar um hetta er ikki tøkt.

Drunnhvíti eigur í smáum holum og opum, í urðum og grýtutum lendi út móti opnum havi. Eisini eigur hann í grótgørðum og gróthúsaveggjum. Hann kann eisini eiga á vøllinum undir síðum, tøttum lyngi. Hann eigur í bølum, men ofta fáir og spjaddir. Hann leitar sær føði úti á opnum havi um dagin, og kemur heim aftur til holuna um náttina, fyri at býta um pláss við makan, ið hevur ligið og bølt, ella fyri at geva unganum. Hann verpur frá miðum juni og út í august. Hann er mest trúgvur í reiðrinum meðan hann liggur á eggi. Hann verpur eittans egg og teir flestu ungarnir eru floygdir tíðliga í oktobur.

---

[15] International Union for Conservation of Nature, www.IUCN.org

### *5.2.3. Lundi*

IUCN metir, at lundi er "ikki hóttur", hóast stovnarnir eru í minking.

Lundastovnurin í Føroyum er ikki taldur. Lundaholur vórðu taldar í Lamba í Mykinesi í 1972; somuleiðis í Skúvoy í 1992. Lundaholur vórðu taldar, og holur kannaðar fyri pisur, í Dalinum og Lamba í Mykinesi í 2011 og í Hólminum í 2012.



**Mynd 7** Lundi. Mynd: Jens Kjeld Jensen.

Stór óvissa er um talið av lunda í Føroyum. Metingar eru gjørdar um støddina á stovninum. Í 1983 varð mett, at stovnurin var "nøkur 100.000 pør". Í 1989 varð stovnurin mettur til 550.000 pør.

Árini 2000 og 2001 vóru síðstu góðu árini hjá lundanum, men tá var veiðan eisini sera stór. Tí er einki at ivast í, at stovnurin er minkaður.

Metingarnar eru grundaðar á omanfyrinevndu teljingar, eygleiðingar og veiðutøl. Hóast stór óvissa er um stovnsstøddina, ber til at siga nakað um, á hvørjum oyggjum lundin er mestur. Tað er mest til á oyggjum har eingin rotta er. Nógv er til av lunda í Mykinesi, Fugloy, Svínoy, Nólsoy, Sandoy, Skúvoy og Stóru Dímun. Meðan minni er til á hinum oyggjunum.

### *5.2.4. Rita*

IUCN metir at rita er "ikki hótt", men ger vart við, at ritustovnarnir sum heild eru í minking.

Ritan reiðrast á smølum rókum í berginum. Reiðrið byggir hon burtur úr móru, grasi, fjaðrum og øðrum. Móruna fær hon úr tjarnum og vøtnum. Hon byrjar at reiðrast frá hálvum mai til hálvan juni, og fer frá landi aftur í august. Høvuðsføðin hjá rituni eru ymisk ryggleys djór og fiskur. Neyvar teljingar av ritu eru í nógv ár gjørdar í Skúvoy.

### *5.2.5. Havhestur*

IUCN metir, at havhestur er "ikki hóttur" , og at stovnarnir sum heild eru í vøkstri.

Havhesturin reiðrast ovarlaga í berginum og í homrum um alt landið. Eggið verður vorpið síðst í mai, og ungarnir eru floygdir í august - september. Havhesturin er ikki einans bundin av einari, ella fáum sløgum av føði, men etur bæði fisk, høgguslokk, djóraplankton og útkast frá skipum. Eisini dámar honum ógvuliga væl hvalaspik, um møguleikin býðst fyri tí. Hóast størsti partur av føðini verður tikið heilt uppi í sjónum, kann hann kava nakrar fáar metrar niður.

### *5.2.6. Teisti*

IUCN metir, at teistin er "ikki hóttur", og at stovnarnir sum heild eru í vøkstri.

Teisti reiðrast í grýtutum lendi og bergi nær sjónum. Hann verpur oftast tvey egg seint í mai til miðjan juni, og eru ungarnir floygdir seint í juli til august. Teisti heldur til nær landi undir reiðringini, og livir fyri stóran part av nebbasild, tarabrosmu og krabba-djórum, ið hann finnur nær botni inni við land.

### *5.2.7. Terna*

IUCN metir, at terna er "ikki hótt", men ger vart við, at ternustovnarnir sum heild eru í minking.

Terna byrjar at reiðrast millum mai og juli. Nær hon byrjar, er ávirkað av hita og hvat er til av føði. Henni dámar best at reiðrast nær sjónum, og har lítið av vøkstri er, so sum á sandi og grúsi. Ternan finnur sær helst føði nær landi, men kann fara víða um at leita sær føði, um lítið er at fáa. Størsti parturin av føðini er smáur fiskur, men hon kann eisini taka krabbadjór uppi í sjónum og insektir á landi.

# 6. Fuglateljing

Grundgevingin fyri at útnevna Nólsoy sum Ramsar-øki var nógvi sjófuglurin, sum reiðrast her. Sjófuglar á okkara leiðum hava tað sum heild trupult, og tí er tað av týdningi at verja øki, har tað er lutfalsliga nógv til av sjófugli. Drunnhvíta- og lunda-stovnarnir verða beinleiðis nevndir, og mett verður, at talið er ávikavist 50.000 og 30.000 pør.

Við jøvnum millumbilum metir Ramsar-skrivstovan um, hvørt grundgevingarnar fyri, at Nólsoy er Ramsar-øki, framvegis eru galdandi. Tí skal vitanin um fuglin í Nólsoy javnan dagførast, og tí er neyðugt at telja drunnhvíta- og lundastovnin og fylgja við í gongdini.

### *6.1.1. Teljing av drunnhvíta*

Drunnhvítastovnurin í Føroyum er ongantíð taldur. Hóast ringmerking og eygleiðingar hava givið innlit í útbreiðslu og meingi, eru tey tøl, ið finnast, einans grundað á metingar uttan skipaðar teljingar. Soleiðis er eisini við drunnhvítastovninum í Nólsoy. Í 2012 varð avgjørt, at nýta metingina upp á 50.000 pør í sambandi við Ramsar-tilnevningina. Hetta talið skal dagførast.

Í 2012 var farið undir at telja drunnhvíta í Nólsoy. Endamálið var "at gera eina álítandi meting av búfugli í drunnhvítastovninum í Nólsoy" og eisini skuldi ein "álítandi meting gerast fyri gongdina hjá drunnhvítastovninum".

Í 2012 og 2013 vórðu øki á umleið 0,25 km$^2$ tald og úrslitið vísti umleið 18.000 pør. Roknað verður við, at hetta er minni enn helvtin av flatuni, ið skal teljast í Urðini, so neyðugt er at telja í tvey til trý ár, áðrenn drunnhvítin í Urðini er taldur. Hóast eingin niðurstøða kann gerast um gongdina eftir einans tveimum árum, so síggja vit, at tættleikin í 2013 var 2/3 av tí hann var í 2012.

Um leysliga metingin á 50.000 pør av drunnhvíta í Nólsoy skal dagførast, er tað neyðugt, at arbeiðið at telja verður gjørt liðugt. Í 2014 rakk fíggingin ikki til framhald av hesum arbeiði, og óvist er, hvussu tað verður framyvir.

### *6.1.2. Mál og tilmæli*

**Mál:** at fylgt verður við gongdini hjá drunnhvítastovninum í Nólsoy.

**Tilmæli:** At arbeiðið við at telja drunnhvíta í Nólsoy kemur í fasta legu.

# 7. Keldur


1. Ríkari framtíð. 13 millumtjóðasáttmálar um náttúru og mentanarumhvørvi (s. 16). Nordisk Ministerråd. TemaNord 2006:564.
2. Hammer, S. 2011. Rottuspjaðing. Umhvørvisstovan. Frágreiðing 2011:3. http://www.us.fo/Default.aspx?ID=5500
3. Olsen, B. 2010. Rottan hóttir heimsins størsta drunn-hvítabøli, og vit hava ábyrgdina. Frøði. Føroya Fróðskaparfelag, Tórshavn. 2: 22-24.
4. Hansen, J. L, J. Danielsen, C. Joensen og S. Sigurdardóttir 2014. Drunnhvíti Hydrobates pelagius. Teljing í Nólsoy í 2013.
5. Simonsen, W. 2011. Grein í Frøði um Ramsar.
6. Um rottu í Nólsoy http://www.jenskjeld.info/FO_side/rotta.html
7. Rottuhundur í Nólsoy. http://www.fisk.fo/media/4698/rottuhundur.pdf
8. Simonsen, W., J.L. Hansen og B. Olsen. 2011. Frágreiðing um Ramsar-virksemi í 2011. http://www.fisk.fo/media/4694/ramsar-2011.pdf
9. Teljing av Drunnhvíta í Nólsoy í 2012. http://www.fisk.fo/media/4662/drunnhvíti-2012.pdf
10. Veiðihagtøl fyri lunda. http://www.fisk.fo/media/4685/lundi-24012011.pdf
11. Fangstrettigheder. Jens-Kjeld Jensen. Lundefangst – en fangstdag på Nólsoy. S. 30-37.
12. Lorentsen, S.-H- & Follestad, A. 2014. Effekter av forstyrrelse på kolonihekkende sjøfugl og effekter av avbøtende tiltak – en litteraturstudie. – NINA Rapport 1033. 37 s. http://www.nina.no/Aktuelt/Nyhetsartikkel/ArticleId/2392.
13. Hammer, S., Madsen, J.J., Jensen, J-K., Pedersen, K.T., Bloch, D., Thorup, T. 2014. Færøsk Trækfugleatlas (The Faroese Bird Migration Atlas). Faroe University Press, Tórshavn
14. Yvirlit yvir Føroya fuglar (Bloch & Sørensen, 1983).


# 8. Fylgiskjøl

1. Kort yvir Ramsar-økið í Nólsoy,
2. Viðtøkur fyri Ramsar-nevndina fyri Nólsoy,
3. Samlað yvirlit yvir tilmæli í Ramsar-ætlanini fyri Nólsoy.

**FYLGISKJAL 1: Kort yvir Ramsar-økið í Nólsoy**

Ramsar Site - Nólsoy, Faroe Islands



## FYLGISKJAL 2: Viðtøkur fyri Ramsar-nevndina fyri Nólsoy

**Endamálið við Ramsar-nevndini er at gera Ramsar-ætlan fyri Nólsoy, sum m.a. skal vísa á møgulig tiltøk, átøk og mannagongdir, sum skulu til, fyri at tryggja, at náttúruvirði í Nólsoy, serliga fuglur og vistskipan teirra, verða varðveitt eftir princippinum um skynsama nýtslu (wise-use).**

Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við allar áhugapartar, við serligum denti á borgarar, felagsskapir o.o. í Nólsoy. Ramsar-nevndin í Nólsoy hevur hesar føstu limir:

- Umhvørvisstovan,
- Søvn landsins/Náttúrugripasavnið,
- Tórshavnar kommuna,
- Ramsar-umboðið hjá Tórshavnar kommunu,
- Umboð fyri hagastýrini í Nólsoy,
- Kunningarstovan í Nólsoy.

Aðrir áhugapartar verða bodnir til fundar eftir tørvi. Nevndin skipar fyri almennum fundum, tá tørvur er á tí. Fiskimálaráðið og Mentamálaráðið fylgja arbeiðinum og fáa avrit av fundarfrásøgnum.

### Ítøkilig mál

1. At eyðmerkja møguligar hóttanir ímóti fuglalívi o.ø., og vísa á verjutiltøk, sum skulu setast í verk. Serligur dentur verður lagdur á at verja og tryggja drunnhvítan og lundan.
2. At gera "Ramsar-ætlan fyri Nólsoy", sum ætlandi skal verða liðug í 2014.
3. At viðgera spurningar, sum eru viðkomandi fyri yvirvøku av Nólsoy sum Ramsar-øki.

### Mannagongdir

- Nevndin fer at hittast javnan í sambandi við, at Ramsar-ætlanin fyri Nólsoy verður gjørd, á leið 1-2 ferðir um mánaðin árið 2014 út.
- Fram til, at Ramsar-ætlanin er liðug, leiðir Umhvørvisstovan arbeiðið og virkar sum formaður og skrivari í nevndini.
- Á leið eina viku áðrenn hvønn fund sendir Umhvørvisstovan limunum uppskot til fundarskrá, og í seinasta lagi 3 dagar áðrenn fundin, fáa limir møgulig fundarskjøl.
- Uppskot til fundarfrásøgn verður sent limunum 1-2 vikur eftir fundin.
- Nevndarlimir, sum ikki eru í almennum starvi, fáa fundarsamsýning og endurgoldið ferðaútreiðslur sambært almennum reglum.

*Viðtøkurnar vórðu samtyktar á fundi í Ramsar-nevndini fyri Nólsoy 14.05.14.*

# FYLGISKJAL 3: Samlað yvirlit yvir tilmæli í ætlanini fyri Nólsoy

## Mál og tilmæli um rottu

**Mál:** Nólsoy skal framhaldandi vera rottufrí.

**Tilmæli:**

1. Seta í verk skipan/mannagongdir fyri vøru, sum verður flutt til Nólsoyar, bæði við tyrlu og skipi, serliga áðrenn hon fer úr Havn, men eisini tá vøran er komin til Nólsoyar.
2. At tilbúgvingarætlan fyri at fyribyrgja rottuinnrás í Nólsoy verður gjørd. Hetta kundi verið gjørt í samstarvi millum Sørvágs-, Tórshavnar- og Skúvoyar kommunur.
3. At neyðugu tiltøkini omanfyri (1.-14.) verða sett í verk.
4. At kunngerðin um oyðing av rottu verður dagførd og víðkað til eisini at fevna um at fyribyrgja, at rotta spjaðist.

## Mál og tilmæli um sigling

**Mál:** Sigling kring Nólsoy skal ikki órógva fuglalívið.

**Tilmæli:**

1. At kunngerð um sigling kring Ramsar-oyggjarnar verður sett í gildi at fyribyrgja, at fuglur verður órógvaður.
2. At lýsa eina loyvisskipan, sum tryggjar, at øll sigling og nýtsla av vatnskutarum er burðardygg, og serliga, at fuglur í Nólsoy ikki verður órógvaður av ferðafólkabátum.
3. Havnarmyndugleikin skal hava mannagongd fyri hvar, ferðamannaskip kunnu liggja.

## Mál og tilmæli um kettu

**Mál:** Ketta skal ikki vera ein hóttan fyri drunnhvíta og annan fugl.

**Tilmæli:** At ansa eftir, um samtyktin virkar sum ætlað.

## Mál og tilmæli um fuglateljing

**Mál:** at fylgt verður við gongdini hjá drunnhvítastovninum í Nólsoy.

**Tilmæli:** At arbeiðið við at telja drunnhvíta í Nólsoy kemur í fasta legu.